


Til allar samkomur og kirkjur í Føroyum !

TeenStreet er, við árunum, blivið eitt sera kent tiltak ímillum føroyingar, og í dag eru tær flestu samkomur og kirkjur í Føroyum umboðaðar til TeenStreet leguna, sum OM skipar fyri í Týsklandi.

## *Bønarvika & upplýsingardagur.*

TeenStreet er sum kunnugt ein lega fyri trúgvandi tannáringar, og á leguni í Týsklandi møtast millum 3 & 4000 trúgvandi tannáringar úr 24 ymiskum londum.

Saman við øllum hesum londum, ynskja vit at biðja tykkum um standa saman við okkum, við at:

1). Seta TeenStreet á skránna sunnudagin 11. Apríl. Um tit hava onkran í tykkara samkomu/kirkju, sum hevur verði á TeenStreet, kundu tey greitt frá onkrum tey hava uppliva á Teenstreet. Á heimasíðuni eru nógvir upplýsingar at heinta, umframt faldarar. Vit senda tykkum fegin faldarar við postinum, um hetta hevur áhuga. Harumframt hava vit eitt videolag, sum er gjørt til TeenStreet 2010, sum er teksta til føroyskt. Heitt verður á øll sum hava verði á TeenStreet tey síðstu árini, og sum eiga eina TeenStreet blusu, um at vera í henni sunnudagin 11. Apríl.

2). Gera viku 11 (5- 11. Apríl) til eina serliga bønarviku fyri TeenStreet. Vit vilja heita á øll trúgvandi, um at seta 5-10 minnuttir um dagin av til bøn fyri TeenStreet, og fyri tannáringunum hesa vikuna. Á www.teenstreet.fo koma bønarevnir, bønarhugskot o.a. at liggja hvønn dag í bønarvikuni.

Vit eru á veg til Týsklands á TeenStreet fund, og har fara vit at fáa enn fleiri upplýsingar um Bønarvikuna og Upplýsingardagin.

Vit vóna at frætta aftur frá øllum samkomum og kirkjum í Føroyum, og so skjótt vit frætta frá tykkum, senda vit tykkum fleiri upplýsingar, umframt videolag, faldarar o.a.

Heilsan við Sálm 23 (sum er evnið fyri TeenStreet 2010) ps. XXIII

Ruth Gaardlykke & Anita Tausen

www.teenstreet.fo teenstreet@teenstreet.fo

Ruth: 519090 ruth@teenstreet.fo
Anita: 597842 anita@teenstreet.fo